QUALITY
INNOVATION
RELIABILITY





Bakkafrost samtakið framleiðir alilaks og liðugvørur úr aksi. Framleiðslueindirnar eru í Norðoyggjum og suður Eysturoy skipaðar í 3 smoltstøðum, 7 alistøðum umframt kryvjivirki í Klaksvík, portiónsvirki og kassavirki á Glyvrum. Vøruúrvalið er breitt innan laksavørur. Høvuðs vøran er laksaportiónir til retailmarknaðin í ES. Tað starvast umleið 160 fólk í samtakinum.

**Virkisleiðari**

Vit søkja eftir virkisleiðara til virkini í Klaksvík og á Glyvrum. Arbeitt verður við ávikavist kryvjing og víðarivirking av laksi.

Virkisleiðarin hevur ábyrgd av:
- Tilrættaleggjan av framleiðslu,
- At framleitt verður sambært vørulýsingum,
- Innkeypi av vørum til framleiðsluna,
- At skipa viðlíkahald av virkjum,
- Starvsfólkum á framleiðsludeildini
- Annað í hesum sambandi eftir nærri avtalu

**Førleikakrøv:**
- Hóskandi hægri útbúgving, t.d. innan matvøruverkfrøði, framleiðslu tøkni og fíggjarstýring
- Fyrikomandi, góð samastarvsog samskiftisevni

**Ynskiligt, tó ikki treyt, er at umsøkjarin hevur hesar førleikar:**
- Kunnleika til og royndir frá líknandi framleiðslu

Starvsstaður: á Glyvrum.

**Umsóknarfreist: 30/11**

Um fyrispurningar eru viðvíkjandi størvunum, so kunna tygum tosa við Regin Jacobsen, stjóra. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Umsóknir skulu sendast til: **Faroe Salmon Processing, Bakkavegur 8, FO-625 Glyvrar, ella bakkafrost@bakkafrost.com, Telefon : 40 50 00, Fax 40 50 09**



# Bussførari

Søkt verður eftir bussførara at koyra á leið 100, 101 og 300.

Áhugaði kunnu ringja á **tlf. 58 90 11.**



# Móttøka



Lisbeth og Roymer Lamhauge hava starvast 40 ár í Postverkinum.

Í sambandi við dagin verður móttøka

**fríggjadagin 30. november 2007 kl. 15 - 17 á posthúsinum, Óðinshædd 2, 100 Tórshavn.**

Øll eru hjartaliga vælkomin.

**postverk.fo**



# Starv á Føroya Barnaheimi

Barnaheimið søkir við hesum eftir einum pedagogi til Ungdómsdeildina at arbeiða 40 tímar um vikuna at byrja 2. Januar 2008 ella eftir nærri avtalu. Pedagogar, sum verða lidnir í februar mánaði 2008, eru eisini vælkomnir at søkja. Tann ið settur verður í starvið, skal starvast í skiftandi vaktum á Ungdómsdeildini, har tað er pláss fyri 6 børnum í aldrinum 12 – 18 ár. Harumframt er eitt bráðfeingispláss.

**Um Ungdómsdeildina:**

Á Ungdómsdeildini eru 8 fólk í starvi, øll við viðkomandi útbúgving.

Endamálið við arbeiðnum á Ungdómsdeildini er, at støði verður tikið í tí einstaka barninum, har dentur fyrst og fremst verður lagdur á umsorganina, vegleiðingina og eygleiðingina. Skaptir verða karmar rundanum barnið, soleiðis at reglusemi kemur í gerandisdagin. Tá talan er um tørvir og ynskir hjá barninum, verður altíð í hvørjum einstøkum føri tikið hædd fyri aldur og førleika annars.

**Førleikakrøv:**

Vit sóknast eftir einum starvsfólki, ið hevur ávísan kunnleika til at arbeiða við børnum og ungum. Tað er umráðandi, at viðkomandi hevur fakligan áhuga og góð samstarvsevni. Tann ið settur verður, skal kunna arbeiða sjálvsstøðugt.

Ein partur av arbeiðnum er skrivligt arbeiði, og umráðandi er, at viðkomandi dugir væl at málbera seg bæði í skrift og talu.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 09.12.2007.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Ulrik Jensen, deildarleiðara ella Beintu Johannesen Mørkøre, leiðara á tlf. 312320

**Føroya Barnaheim**
Pedda við Steingøta 10
FO-100 Tórshavn



# BRÚÐARKOYRING



Skalt tú hava eina serliga uppliving, so er at leiga ein bil hjá Havnar Bilasavni frá Sp/F Bilrøkt í Havn. Vel t. d. ein svartan Ford A frá 1930, ein hvítan Chevrolet frá 1931, ein bláan Chevrolet Skyline frá 1952 ella ein brúnan Jaguar frá 1978

**Ring til Bilrøkt á 588880**
www.bilrokt.fo bilrokt@bilrokt.fo



# Sølustevna

**Sølustevnan verður í Glæmuni í Kvívík leygardagin 1. des. 2007**

**Byrjað verður kl. 10.00 og endað verður kl. 18.00**

**Tey luttakandi eru hesi**

**Startrade v/ Ragnar Isaksen Kvívík**
– Klæðir v.m.

**Rannvá & Beinta Kvívík**
– Smykkir v.m.

**Biosol**
– Reingerð v.m.

**Triumf**
– Undirklæðir

**AmWay**
– Náttúrproduktir

**Hilda av Oyri**
– Ymiskt jólaprýði

**Alvilda Simonsen**
– Ymiskt heimabundið

**Elsy Joensen**
– Ymiskt handaligt

**Brynhild Joensen**
– Ymiskt heimabundið

**10 flokkur**
– Tombola

**Eisini verður Glæmu-Café har okkurt gott verður til matnað.**

**Bygdarfelagið Glæman**





# Verkhúsið Stíggjur

**Jólasølan 2007**, verður hósdagin 29. nov kl 14-18, og fríggjadagin 30 nov. kl 14-19.

Eisini verður málningaframsýning, tombola og kaffisøla.

**Øll eru hjartaliga vælkomin!**





Grón

Tlf 312161
gron@gron.fo
www.gron.fo

**Bestu piparnøturnar fáa tit hjá okkum**